

Myndin omanfyri sýnir framsýningina av arbeiðsvikuni í Hoydølum, har næmingarnir høvdu valt dálking, sum evni.

Framhald frá 1. síðu (1)

Jú, avgjørt ein áhugaverdur fyrilestur, um kanska okkurt tyktist verða eitt sindur torført at skilja.

Orðaskifti

Undir orðaskiftinum, sum varð hildið aftaná fyrilesturin, komu fram mangar hugsanir í hesum máli. Luttakararnir settu Boga Hansen spurningar, og royndi hann at svara so væl, hann kundi.

Finnur Johansen nevndi, at føroyingar óivað dálka líka nógv sum onnur, og hann ivaðist ikki í, at trupulleikin í Føroyum er stórur. Fólkavøkstur og dálking eru tvey lið, ið hoyra saman, tá talan er um slíkan vanda, og í samband við fólkavøkstur verður tað óivað so, at eftirkomarar okkara skulu søkja um at fáa børn, til tess at heimurin kann breyðføða tey, segði Finnur Johansen.

Kjartan Hoydal segði, at hann helt størsta dálkingarvandan hjá okkum vera ovurfisking.

Birgir Danielsen vildi vísa hesum aftur, og helt, at vit eiga ikki at hugsa sum so, tí føroyingar liva jú av fiskinum.

Gunnar Waagstein vísti á áir í Havnini, at hópur av tí lívi, ið har var, er deytt, m.a. sílið.

Hann nevndi, at ein orsøk til hetta kundi kanska vera tey ymsu vaskievnini, ið húsmóðurin nýtir, og sum fer í áirnar. Eisini nevndi hann, at somu við urskifti gera seg galdandi á eystaru vág.

Gunnar Waagstein eftirlýsti samstundis møguleikan at nýta annað vaskievni.

Guttorm Djurhuus, ið er kemiverkfrøðingur, vildi vera við, at vaskievnini vóru ikki orsøkin til dálkingina á Eystaru vág, men harímóti kloakkir og annað slíkt. Hann helt, at nú nýggi molin varð gjørdur, áttu kloakkirnar at verða lagdar út um molan, so at sloppið kundi verið undan lukti og tilíkum á vánni.

Birgir Danielsen segði, at ein møguleiki til tess at fyribyrgja mátti verið í læknavísindini. Hvussu við eini koppseting móti teim ymsu dálkingargreinunum?

Til hetta segði Bogi Hansen, at bert at koppseta fólk ímóti teim ymsu dálkingargreinunum, var alt ov lítið, til tess at fyribyrgja.

So mátti t.d. fiskurin, ið kann hava kviksilvur í sær, eisini verða koppsettur. Bogi Hansen legði aftrat, at fólkavøksturin *má* og *skal* verða minkaður, fyrr enn ikki eigur at verða farið harðliga fram.

Fútin, J. Klerens, vísti á eina áheitan frá heilsunevndini til kommununa í Havn, um at fáa kloakkir út um nýggja molan, men varð hetta ein figgj arligur spurningur, sum framvegis ikki var loystur.

Løgmaður, Atli Dam, segði, at framvegis tykist nógv at vera ókent í sambandi við dálking, og hetta ger spurningin enn torførari. Myndin í modellinum kann tí verða broytt.

Hann helt avgjørt, at Føroyar eiga at vera við í hesum spurningi, og vísti á, at tvey føroysk umboð vóru á dálkingarstevnunum í Reykjavík og Stockholm í summar. Nevndin, ið arbeiðir við m.a. dálkingarmarki, kemur væntuliga at leggja fram uppskot í komandi tingsetu.

Løgmaður segði seg vera fegnan um, at feløg tóku hendan álvarsliga spurning til viðgerðar, og nevndi, at almenna umsitingin óivað kundi nýta tað til far, ið feløg høvdu um spurningin, at arbeiða víðari við. Løgmaður takkaði at enda fel agnum fyri hetta áhugaverda tiltak.

Eftir okkara tykki var hetta ein áhugaverdur fundur, og vil ja vit í hesum sambandi heita á onnur feløg um at hava fund ir við dálking á skránni, tí vit eiga sanniliga okkara lut í hesum máli.

john.-



Eg takki Óla Andnegl fyri, at hann er farin at kunngera valevnislista javnaðarfloksins til býráðsvalið!

FERÐAÆTLAN galdandi frá 18. okt. 1972

Ms. »TRÓNDUR« SUNDALAGIÐ—SKÁLAFJØRÐUR

Mánadag	Týsdag	Mikudag	Hósdag	Fríggjadag	Leygardag	Sunnudag
kl. 7.00 [1] [2] Tórshavn Strendur Toftir kl. 8^{00} Tórshavn	**kl. 7.00** [1] [2] Tórshavn Strendur Toftir kl. 8^{00} Tórshavn	**kl. 7.00** [1] [2] Tórshavn Strendur Toftir kl. 8^{00} Tórshavn	**kl. 7.00** [1] [2] Tórshavn Strendur Toftir kl. 8^{00} Tórshavn	**kl. 7.00** [1] [2] Tórshavn Strendur Toftir kl. 8^{00} Tórshavn	**kl. 7.00** [3] Tórshavn Strendur Toftir kl. 9^{00} Tórshavn	**kl. 10.00** [1] [2] Tórshavn Strendur Toftir kl. 11^{00} Tórshavn
kl. 13.00 [1] [2] Tórshavn Toftir kl. 13^{30} Strendur Tórshavn	**kl. 10.00** Tórshavn Toftir Strendur Saltangará Skála Strendur Toftir kl. 12^{30} Tórshavn	**kl. 13.00** [1] [2] Tórshavn Toftir kl. 13^{30} Strendur Tórshavn	**kl. 10.00** Tórshavn Toftir Strendur Saltang. kl. 11^{30} Kollafjørð Oyri kl. 13^{00} Strendur Toftir kl. 14^{30} Tórshavn	**kl. 10.00** [1] [2] Tórshavn Toftir Strendur Saltangará Skála Strendur Toftir kl. 12^{30} Tórshavn	**kl. 14.00** [1] [2] Tórshavn Toftir kl. 14^{30} Strendur Tórshavn	**kl. 17.00** [1] [2] Tórshavn Toftir kl. 17^{30} Strendur Tórshavn
kl. 18.00 [1] [2] Tórshavn Toftir kl. 18^{30} Strendur Tórshavn	**kl. 18.00** [1] [2] Tórshavn Toftir kl. 18^{30} Strendur Tórshavn	**kl. 18.00** [1] [2] Tórshavn Toftir kl. 18^{30} Strendur Tórshavn	**kl. 18.00** [1] [2] Tórshavn Toftir kl. 18^{30} Strendur Tórshavn	**kl. 18.00** [1] [2] Tórshavn Toftir kl. 18^{30} Strendur Tórshavn	**kl. 17.00** [1] [2] Tórshavn Toftir kl. 17^{30} Strendur Tórshavn	**kl. 20.00** Tórshavn Toftir kl. 20^{30} Strendur Tórshavn

[1]) Samband úr Klaksvík til Havnar.
[2]) Samband úr Havn til Klaksvíkar.
[3]) Samband til og frá Klaksvík.

VETRARFERÐAÆTLAN fyri »TERNUNA«

Í SAMSIGLING VIÐ M/S TRÓNDA FRÁ 18. OKT. 1972

Mánadag	Týsdag	Mikudag	Hósdag	Fríggjadag	Leygardag	Sunnudag
kl. 6.30 Klaksvík Fuglafjørð kl. 8.45 Fuglafjørð Klaksvík kl. 12 Klaksvík Fuglafjørð kl. 14.15 Fuglafjørð Klaksvík kl. 17 Klaksvík Fuglafjørð kl. 19.15 Fuglafjørð Klaksvík	kl. 6.30 Klaksvík Fuglafjørð kl. 8.45 Fuglafjørð Klaksvík kl. 17 Klaksvík Fuglafjørð kl. 19.15 Fuglafjørð Klaksvík	kl. 6.30 Klaksvík Fuglafjørð kl. 8.45 Fuglafjørð Klaksvík kl. 12 Klaksvík Fuglafjørð kl. 14.15 Fuglafjørð Klaksvík kl. 17 Klaksvík Fuglafjørð kl. 19.15 Fuglafjørð Klaksvík	kl. 6.30 Klaksvík Fuglafjørð kl. 8.45 Fuglafjørð Klaksvík kl. 17 Klaksvík Fuglafjørð kl. 19.15 Fuglafjørð Klaksvík	kl. 6.30 Klaksvík Fuglafjørð kl. 8.45 Fuglafjørð Klaksvík kl. 11 Klaksvík Fuglafjørð kl. 12 Fuglafjørð Klaksvík kl. 17 Klaksvík Fuglafjørð kl. 19.15 Fuglafjørð Klaksvík	kl. 7.30 Klaksvík Fuglafjørð kl. 8.45 Fuglafjørð Klaksvík kl. 13 Klaksvík Fuglafjørð kl. 15.15 Fuglafjørð Klaksvík kl. 16 Klaksvík Fuglafjørð kl. 18.15 Fuglafjørð Klaksvík	kl. 9.30 Klaksvík Fuglafjørð kl. 11.45 Fuglafjørð Klaksvík kl. 16 Klaksvík Fuglafjørð kl. 18.15 Fuglafjørð Klaksvík

VIÐMERKING:

Eftir vetrarferðaætlanini hevur TERNAN ikki samband við ella frá TRÓNDA, sum siglir úr Tórshavn týsdag kl. 10, hósdag kl. 10 og sunnudag kl. 20.

Um neyðugt kunnu broytingar í ferðaætlanini verða gjørdar.

STRANDFARASKIP LANDSINS